## TIM – Ongland: 4.-14. August 2010

**Aldur** : 16-18 ár.
**Hvar:** Southampton, Ongland
**Trísur**: Kr. 1200,- (Ferðakostnaður ikki íroknaður.)

Vit ynskja at læra, venja, uppmuntra og avbjóða trúgvandi tannáringar at avspegla Jesus Kristus og at brúka teirra Gudgivnu gávur til at geva vón til heimin. Sum eitt úrslit av hesum, vóna vit at uppliva at alt samfelagið í Southamton verður ávirkað. Vit vóna eisini, at allir luttakarar fara avstað aftur styrktir í trúnni og við einum enn djypri longsli eftir at deila teirra trúgv við vinirnar heima.

Tú fert at vera saman við ungdómum frá nógvum ymiskum londum. Saman fáa tit kunning og venjing, so tit betur kunnu deila tykkara trúgv við onnur. Síðani fara tit at røkka út til børn, ung og teirra familjur. Flestu dagarnar verður eisini NET-tíð, har tit møtast í smáum bólkum at tosa saman, deila við hvønn annan og biðja saman.

**Skráin.** Skráin verður fjølbroytt og rættað ímóti tannáringum. Tú kemur at arbeiða í samfelagsverkætlanini, sum longu er á staðnum, har tú verður við til at styrkja um sambondini, sum longu eru sprottin ígjøgnum fleiri ár. Hvørt ár koma vit saman við einum hjálparbólki í einum illa staddum øki. Hvønn dag bjóða vit teimum at koma til stuttlig tiltøk fyri børnunum, teim ungu og teirra familjum. Har verður bæði "kids club", andlitsmáling, hárflætting, neglamáling, hoppiborgir, ítróttur, spøl, drama, dansur, grilling og nógv annað stuttligt. Tannáringar fáa møguleikan at hjálpa til við øllum teim ymisku tiltøkunum umframt at knýta vinarbond til tey ungu í økinum.

Nærri upplýsingar :
Anita 597842 anita@teenstreet.fo
Ruth ruth@teenstreet.fo 519090





